# Barnafrádrátt til barnið er 18 ár

*Kristian Magnussen, løgtingsmaður, fer í dag at leggja uppskot fyri tingið um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti, soleiðis, at foreldur fáa barnafrádrátt, til barnið er 18 ár*



John Johannessen

Sum er, verður barnafrádráttur veittur foreldum ella uppihaldarum til barnið er 16 ár. Hesin skattafrádráttur verður veittur fyri hvørr barnið, ið ikki er fylt sekstan ár í byrjani av tí álmanakkaári, sum skattur er ásettur fyri.

Uppskotið, sum Kristian Magnussen vegna Javnaðarflokkin leggur fram, leggur upp til, at hesin stuðul verður veittur til barnið er 18 ár.

Grundgevingarnar hjá Kristiani Magnussen fyri hesum eru, at ungdómurin í dag gongur munandi longri í skúla og býr tíksil longri heima. Kristian Magnussen vísir á, at ,i dag er fólkaskúlalógin broytt soleiðis, at vit hava 9 ára kravda skúlagongd, og skipanin við útbúgvingarstuðli er broytt til, at ung undir 18 ár frá 1. august ár 2000 ikki longur fáa útbúgvingarstuðul, uttan mun til hvørjum stigi skúlagongdin er á. Frá miðnámsstigi verður tó møguligt at fáa avmarkaðan stuðul til skjalprógvaðar skúlatilfarðsútreiðslur Ávís tíðarskeið í sjeyti, áttati og nítiárunum hevur t.d. borið til hjá ungdómi undir 18 ár at fingið lestrarstuðul, eisini meðan tey gingu í fólkaskúlanum. Sum orsøk til ikki longur at veita lesandi á miðnámsstigi lestrarstuðul í nýggju lógini, ið kom í gildi á sumri 1999, varð sagt, at foreldur hava skyldu at forsyrgja børnum sínum til hesi fylla 18 ár.

Kristian Magnussen heldur sostætt, at nýggja útbúgvingarskipanin fer at økja um uppihaldsútreiðslurnar hjá foreldrum at 16 og 17 ára gomlum, sum ganga í skúla.

– Sum er, hava foreldur skyldu at forsyrgja børnum sínum, til hesi gerast 18 ár, og eigur barnafrádrátturin í skattinum tí eisini at vera galdandi, til børnini gerast 18, og tá skulu forsyrgja sær sjálvum, sigur Kristian Magnussen

Tingmaðurin vísir á, at allir flokkar á tingi nýta eitthvørt høvi, ið býðst, at sannføra veljaran um, at flokkar teirra raðfesta trivnaðin hjá familjunum ovarlaga. Nýggja lógin um útbúgvingarstuðul ger umstøðurnar hjá nógvum foreldrum verri, og heldur hann hetta neyvan vera í tráð við støðu flokkanna um at betra um trivnaðin og møguleikarnar hjá føroysku familjunum.

# Seinasti kaffifundurin

*Í gjár vóru seinastu kaffifundirnir í Tinganesi við ávíkavist Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin, áðrenn fullveldismálið fer í uttanlandsnevndina*



*Landsstýrið og Javnaðarflokkurin skilja eftir opið tos yvir borðið nú hvønn annan*

***Mynd: Jonhard Hammer***

John Johannessen

Sokallaða politiska prosessin í fullveldismálinum er nú av. Fyrradagin vóru seinastu fundirnir við ávikavist Miðflokkin og samgonguumboðini í uttanlandsnevndini og í gjár vóru seinastu fundirnir við ávikavist Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin.

Áhugaverdasti fundurin í gjár var uttan iva fundurin við Javnaðarflokkin. Hesin hevur nevniliga fyri stuttum meldað út, at hann nú skilir sjónarmiðini hjá landsstýrinum somuleiðis, sum landsstýrið skilir sjónarmið Javnaðarfloksins. Hinvegin hevur Sambandsflokkurin gjørt greitt, at hann einki hevur fingið burturúr kaffifundunum, og at hann framvegis hvørki skilir ella tekur undir við fullveldisætlan landsstýrisins.

Javanaðarflokkurin varð á fundinum í gjár kunnaður um innihaldið í uppritinum til samráðingaruppleggið, men formaður floksins, Jóannes Eidesgaard, hevur ongar viðmerkingar til fjølmiðlarnar um uppritið. Heldur ikki vil hann siga, um flokkurin hevur givið landsstýrinum nakrar viðmerkingar um uppritið ella, um flokkurin tekur undir við innihaldinum í uppritinum.

Einasta viðmerkingin frá Jóannesi Eidesgaard er, at Javnaðarflokkurin nú bíðar eftir fundarboðum frá uttanlandsnevndini, har breiða semjan skal finnast um eitt samráðingarupplegg til donsku stjórnina um ríkisrættarligu støðu Føroya.

Høgni Hoydal, landsstýrismaður í sjálvstýrismálum og varaløgmaður, sigur seg vera væl nøgdan við seinasta kaffifundin. Hann sigur, at høvuðsmálini í uppritinum til samráðingaruppleggið vórðu gjøgnumgingin, og at tosað var leyst yvir borðið um ymisku málini og sjónarmiðini.

Landsstýrismaðurin vil tó ikki siga nakað um, hvussu nær Landsstýrið og Javnaðarflokkurin eru í málinum um ríkisrættarligu støðuna. Hann vil ikki heingja Javnaðarflokkin upp á nakað.

– Politisku høvuðsmálni hava allatíðina verið greið. Vit skulu gerast sjálvbjargin. Trupulleikarnir, ið hava skilt okkum, hava verið tekniskir og juridiskir. Men politiska prosessin hevur staðfest, hvar ósemjurnar eru, sigur Høgni Hoydal og vísir á, at tað í seinasta enda verða allir flokkar á tingi og allir føroyingar við valrætti, ið koma at avgera lagnuna hjá fullveldisætlanini.

Høgni Hoydal roknar við, at politska prosessin, sum nú er liðug, fer at gera tað léttari hjá uttanlandsnevndini at viðgera málið. Men hann leggur dent á, at landsstýrið ikki fer at blanda seg upp í arbeiðið hjá uttanlandsnevndini. Hon skal sleppa at viðgera málið, sum hon vil og so leingi, sum hon vil. Landsstýrið skal bara allatíðina standa til taks at svara spurnigum, sigur hann.

REPROZ
GRAFISKAR LOYSNIR
Tel +298 31 95 40
Fax +298 31 75 41
Alt innan prentlutir
Mail: jakzac@post.olivant.fo

# Læknafelag Føroya ynskir konstruktivan dialog

Í sambandi við nevndarfund í Føroya Læknafelag var eisini aktuella støðan í føroyska heilsuverkinum til umrøðu.

Læknafelagið harmast um tann ótryggleika, sum bygnaðar- og fíggjartrupulleikarnir í heilsuverkinum hava við sær fyri sjúklingar og starvsfólk. Læknafelagið metir, at so sum strukturin er í føroyska heilsuverkinum í løtuni, er fíggjarkarmurin ikki nóg víður til at reka heilsuverk á norðurlendskum støði.

Vit harmast um tað álitisbrot, sum er íkomið millum politiska-/umsitingarliga myndugleikan og Serlæknafelagið. Í tráð við mál felagsins er Læknafelagið til reiðar at vegleiða og annars luttaka í einum konstruktivum dialogi við avvarðandi myndugleikar um føroyska heilsuverkið

**N. Petur Nielsen,**
**formaður**



# Frí parkering í Miðbýnum

*Seinastu tíðina hevur rættuligt óskil valda, tá um ræður parkeringsviðurskiftini í gongugøtuni*



*Sum tað sæst á myndini, so standa bilar fram við báðum vegøkslum á gongugøtuni. Tað hevur viðført ónøgd frá fleiri handilsfólkum í Miðbýnum, at Býráðið enn ikki hevur avgreitt málið viðvíkjandi parkeringsøkjunum.*

***Mynd: Álvur Haraldsen***

Jákup Mørk

Tað hevur nevnliga verið soleiðis, at fyrr var bert loyvt at seta bilarnar við vinstru vegøksl á strekkinum frá Káta Horninum og oman móti kioskini á Vaglinum.

Í løtuni er henda reglan tó ikki galdandi, tí løgreglan hevur sýtt fyri at ansa eftir parkeringsviðurskiftunum á økjunum, við tað at básarnir, sum bilarnir kunnu setast á, ikki eru nóg væl merktir.

Hetta hevur havt við sær, at alt vegastrekki í dag verður nýtt til langtíðarparkering hjá teimum, sum starvast í miðbýnum, og er hetta til miklan ampa hjá handlunum á staðnum.

Við tað at básarnir nú verða nýttir til langtíðarparkering hjá teimum, sum dagliga starvast í Miðbýnum, ber ikki til hjá viðskiftafólkum at seta bilarnar frá sær.

**Jólatrøll**

Tummas Hanus Dam, sum er ein teirra, sum rekur handil í miðbýnum, sigur við Sosialin, at hetta millum annað merkist, tá vørur skulu latast handlunum.

Í dag er tað soleiðis, at tað er so at siga ógjørligt at seta bilarnar, sum koma við vørunum, nærhendis handlinum, og tískil er einasta loysnin at seta bilin mitt á vegin, meðan vørurnar so verða ripaðar inn í handilin.

Sjálvur var Tummas Hanus á býráðnum í summar, har hann heitti á teknisku nevnd um at avgreiða hetta mál. Hann nevndi tá onga dagfesting sum evstamark fyri hesum, men kortini hevði hann vóna, at hetta fór at verða gjørt í farna árinum, so talan ikki gjørdist um jólatrøll.

Hann fekk tá at vita, at gongd var á málinum, men at teir ikki kundu lova honum, at hetta fór at verða avgreitt til jóla.

Í dag er tað sjón fyri søgn, at talan gjørdist um eitt jólatrøll, sjálvur heldur Tummas Hanus, at tað er við at vera skomm, at málið hevur verið so leingi í nevnd, uttan at nakað ítøkjuligt er hent.

Hann leggur eisini afturat, at eftir hansara tykki er støðan hjá løgregluni væl skillig, tí tað er sjálvsagt ein keðiligur lutur, um teir skulu skriva bøtur til fólk, sum ikki vita av, at parkering ikki er loyvd fram við vinstru vegøksl.

At enda sigur Tummas Hanus, at tað sigur eitt sindur um áhugan hjá býráðnum fyri miðbýnum, at málið skal taka somikið langa tíð. Í veruleikanum er talan bert um einar fimm parkeringsbásar, umframt eina møguliga reglugerð um av- og áskipan av vørum.

**Ein loysn er á veg**

Leivur Hansen, borgarstjóri, greiddi í gjár frá, at orsøkin til parkeringsóskilið í miðbýnum er, at fyri hálvum øðrum síðani varð herverk framt á blómukassarnar, sum fram til tá høvdu syrgt fyri, at parkeringsbásarnir vóru væl merktir.

Leivur greiðir annars frá, at málið er í løtuni er í teknisku nevnd, og at tað nú fyriliggja greiðar ætlanir um, hvussu parkerings- og ferðsluviðurskifti skulu skipast í framtíðini.

Spurdur um hálvt annað ár ikki er rættuliga lang tíð, tá talan er um eitt somikið lítið mál, sigur Leivur, at orsøkirnar til hetta eru fleiri.

Tá blómukassarnir í sínari tíð vórðu tiknir burtur, var ætlanin upprunaliga at umvæla hesar. Seinni varð avgjørt, at nýggir blómukassar skuldu setast upp, men ósemja var um, hvussu skapið á hesum skuldi verða.

Leivur legði afturat, at hóast tað kann tykjast, at alt ov long tíð er liðin, so metir hann tað hava størri týdning at nýta langa tíð til at finna eina loysn, sum allir partar kunnu góðtaka, heldur enn at skunda sær at loysa málið, við tí úrsliti at talan verður um eina vánaliga loysn.

Leivur vísti okkum annars til teknisku deild á býráðnum, fyri at vita nærri um málið, men tá blaðið fór til prentingar í gjár, hevði ikki eydnast okku at fáa fatur á nøkrum haðani.

# Nýggj politistøð

*Føroysku politimyndugleikarnir hava kannað, um Marinustøðin kann nýtast sum politigarður í framtíðini*

Jákup Mørk

Sum kunnugt hava spariætlanir viðført, at Marinustøðin, sum í fleiri ár hevur ligið við Hoyvíksvegin, skal flyta alt virksemið niðan í Mjørkadal, har Flyvestation Torshavn í fleiri ár hevur hildið til.

Dúgliga hevur verið gitt um, hvat bygningurin við Hoyvíksvegin skal nýtast til eftir hetta, og fyri stuttum hoyrdist so, at Politistøðin skuldi flyta úr Jónas Broncks gøtu niðan á Hoyvíksveg.

**Hava hugt**

Jens Severinsen, varafúti, sigur við Sosialin, at hetta er í hvussu so er ikki eitt mál, sum støða verður tikin til her og nú.

Hann váttar tó, at politimyndugleikin í Føroyum, saman við byggideildini hjá ríkispolitinum, hevur verið og hugt at Marinustøðini, soleiðis at greiða kann fáast á, um karmarnir har eru hóskandi til eina nýggja politistøð.

Sum sagt er einki avgjørt hesum viðvíkjandi, og Jens Severinsen legði afturat, at ein avgerð hesum viðvíkjandi liggur nakað væl frammi í tíðini.

Um hólmurin í Hoyvíkstjørn til ta tíð skal hýsa fangunum, sigur søgan tó einki um.



*Enn er ikki avgreitt, hvørjum endamálið Marinustøðin við Hoyvíksvegin skal tæna í framtíðini, men møguliga verður talan um nýggjan politigarð*

***Mynd: Álvur Haraldsen***